# Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| **Dagur** | **Dystur** | **Dómari** |
|---|---|---|
| 02.05 | HB-VB/S | Rúni Gaardbo |
| 02.05 | EB/S-NSÍ | Petur Reinert |
| 02.05 | AB-KÍ | Dagfinn Olsen |
| 02.05 | GÍ-B36 | Eiler Rasmussen |
| 02.05 | Skála-B71 | Lars Müller |

# Kloose og Toni til Bayern

Sambært týska Süddeutsche Zeitung skal Bayern München styrkja sær munandi um hópin til komandi kappingarár. Felagið sigst hava ætlanir um at keypa tveir av vandamestu áleyparunum í Europa. Nevnliga Luca Toni og Miroslav Klose. Klose kann fáast ókeypis, tá sáttmáli hansara gongur út í summar. Toni sigast kosta 135 mió kr. Hartil skulu teir báðir sjálvandi hava eina hampuliga góða ársløn.

AB-KÍ:

## Lagnuløta fyri báðar partar

**AB er um at grógva fast í botninum, og klaksvíkingar, sum fríggjadagin siga farvæl við Chris Cerroni, kunnu illa bera ikki at fáa fult á Argjum**

Fótbóltur
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Felags fyri bæði AB og KÍ er, at tað ikki hevur gingið eftir vild. AB hevur einki stig vunnið síðani í fjórða umfari, tá ið argjamenn vunnu inni á Skála, og KÍ hevur einki fingið burturúr tvær tær seinastu ferðirnar, tá ið FM favorittarnir í HB og EB/Streymi hava verið á skránni.

Nú skal KÍ spæla ímóti AB, Skála og GÍ. Um klaksvíkingar ikki vinna í kvøld, verður talan næstu ferð um at renna undan botnplássunum.

Í AB eru allir spælararnir tøkir. Tó er ivi um týdningarmiklasta spælaran av øllum. Toppskjúttin Súni Fríði Barbá hevur havt skaða at dragast við, og í gjárkvøldið var tað ikki greitt, um hann verður førur at spæla í kvøld.

Í Klaksvík er stórt mannfall. Kaj Ennigarð, Erling Fles og Chris Cerroni eru framvegis skaddir. Chris Cerroni hevur spælt millum lítið og einki higartil, og tá ið hann hevur verið á vøllinum, hava avrikini ikki verið sannførandi. Nú hevur hann biðið um at sleppa til hús, og hann sigur farvæl og fer úr Klaksvik fríggjadagin.

Harley Bertholdsen, Leon Bjartalíð og Julian Samuelsen fóru allir skaddir av vøllinum sunnudagin. Onkrir teirra eru ivasamir í kvøld. Tí hevur Tony Paris gjørt av, at Kristian á Lakjuni skal við Formula liðnum suður á Argir í kvøld.

HB – VB/Sumba:

## Christian Høgni ikki við móti suðuroyingum

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Christian Høgni Jacobsen fekk ein vøddaskaða móti NSÍ og verður ikki við í kvøld, og eisini er okkurt annað ivamál hjá HB. Suðuroyingarnir vanta ein týdningarmiklan leikara, nevniliga knæskadda Evrard Ble

Tað verður uttan Christian Høgna Jacobsen at HB fer á vøllin í kvøld. Runavíkingurin fekk ein vøddaskaða í dystinum móti gomlu liðfeløgnum í NSÍ sunnudagin, og tí hevur hann givið avboð til í kvøld.

Hetta er ein missur hjá HB, og tí kemur tað ikki væl við, at ein annar áleypari er rættiliga ivasamur. Páll M. Joensen fekk eins og Christian Høgni ein snudd sunnudagin, og hevur hann ikki vant í vikuni. Tískil er tað ikki vist, at hann verður partur av hópinum hjá HB í kvøld.

Er tað ein missur hjá HB, at Christian Høgni ikki er við teimum í kvøld, so er tað ein øgiligur smeitur hjá VB/Sumba, at teir mugu vera týdningarmesta leikaran fyri uttan. Evrard Ble gjørdist skaddur móti NSÍ og hevur ikki spælt síðani. Í Suðuroy siga tey, at tað sær ógvuliga álvarsamt út hjá miðvallarleikaranum, sum gongur við skinnara frá fótinum og uppum knæið.

Tí er tað eisini so sum so við vónunum, nú VB/Sumba er komið norður um fjørðin at spæla. Teir hava tapt fimm dystir á rað og skulu nokk rokna við, at tapa sættu dystin í kvøld, tá teir vitja hjá HB, sum sær út til at hava funnið stevið eftir eina trilvandi byrjan.

# Dupult gull hjá Peturi

**Stóri veteranurin í føroyskum borðtennis prógvaði enn einaferð, at hann framvegis er maðurin, sum tú skalt vinna á, um tú ætlar tær gullið**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Petur Niclassen vann FM-kappingina í borðtennis, tá hendan var hildin um vikuskiftið. Honum á baki kom ein annar veteranur, nevnliga Birgir Carlsson, og síðani kom Hallur Niclassen. Eisini í tvímansleikinum vann Petur gull. Hesa ferð saman við Ragnar Egilsson.

Hjá kvinnunum var tað Susie Midjord, sum vann einmansleikin, og saman við Rakul Mikkjalsdóttir var hon eisini partur av besta parinum í tvímansleiki. Hartil gjørdist Susie saman við Pæturi Albinus nummar tvey í blandaðum tvímansleiki. Hera vórðu tað Sheila Størm og Ragnar Egilsson, sum vunnu.

Úrslitini í kappingini leygardagin vóru hesi:

**Einstaklingar, meistaradeild:**
1 Petur Niclassen, Tór
2 Birgir Carlsson, Tór
3 Hallur Thorsteinsson, Tór

**Tvímansleikur, meistaradeild:**
1 Petur Niclassen, Tór
og Ragnar Egilsson, Tór
2 Hallur Thorsteinsson, Tór
og Rói Agnarsson, Tór

**Blandaður tvímansleikur:**
1 Sheila Strøm, TBF
og Ragnar Egilsson, Tór
2 Susie Midjord, TBF
og Pætur Albinus, Tór

**Einstaklingar, kvinnur:**
1 Susie Midjord, TBF
2 Joan Thomsen, TBF
3 Rakul Mikkjalsdóttir, TBF

**Tvímansleikur, kvinnur:**
1 Susie Midjord, TBF
og Rakul Mikkjalsdóttir,TBF

**Einstaklingar, kvinnuunglingar:**
1 Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
2 Susie Midjord, TBF
3 Sheila Strøm, TBF

**Tvímansleikur, kvinnuunglingar:**
1 Susie Midjord, TBF
og Rakul Mikkjalsdóttir, TBF

**Einmansleikur, mansunglingar:**
1 Hallur Thorsteinsson, Tór
2 Rói Agnarsson, Tór
3 Fróði Jensen, TBF

**Tvímansleikur, mansunglingar:**
1 Rói Agnarsson, Tór
og Hallur Thorsteinsson, Tór
2 Pætur Albinus, Tór
og Fróði Jensen, TBF

# Ársins bestu

Á gallakvøldi eftir kappingina vórðu bestu spælararnir hetta árið kosin, og vóru tað hesi, sum fingu serstaka heiðurin:
Ársins leikari, menn: Petur Niclassen, Tór
Arsins leikari, kvinnur: Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
Ársins stjørnuskot: Hallur Thorsteinsson, Tór og Rói Agnarsson, Tór
Ársins herðaklapp: Vagnur Nolsøe, TBF



*Petur Niclassen hevði enn eina ferð eitt gott borðtennisvikuskiftið. Tvey gullmerki og heiðurin sum ársins spælari fullu í hansara lut*

## Landsliðið úttikið

Eftir FM-kappingina var eisini greitt, hvørjir spælarar manna landsliðið, sum í summar skal royna seg á Rhodos. Umframt føroysku spælararnar er Kjartan Eli Hentze eisini partur av liðnum. Í fjør vann Thomas Rasmussen gull fyri Føroyar í einmansleiki, men hann er tó ikki partur av liðnum hesaferð. Tey, ið nú manna landsliðið, eru: Kjartan Eli Hentze, Ragnar Egilsson, Hallur Thorsteinsson, Rói Agnarsson, Marin í Dali, Sheila Strøm, Susie Midjord, Rakul Mikkjalsdóttir

formuladeildin

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 13 | 4 | 9 | 15 |
| 2 B36 | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 13 |
| 3 NSÍ | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 12 | 7 | 5 | 12 |
| 4 HB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 13 | 10 | 3 | 10 |
| 5 B71 | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 11 | 9 | 2 | 8 |
| 6 GÍ | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 12 | -3 | 8 |
| 7 KÍ | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 12 | 9 | 3 | 7 |
| 8 Skála | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 7 | 13 | -6 | 6 |
| 9 AB | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 8 | 14 | -6 | 4 |
| 10 VB/S | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 3 | 16 | -13 | 3 |